# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 24. november, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Durita á Heygum, Malan Stórá, Herit Magnussen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál komin avtrat at viðgera fyri opnari hurð:

- Endurskoðað fíggjarætlan fyri 2016

Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málið á skránna sum mál 191 at viðgera fyri opnari hurð.
Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 189**
Áseting av kommunuskattaprocenti, barnafrádrátti og foreldragjaldi fyri børn á dagstovni og í frítíðaransing.
J.nr. 00.30.10-S02-1-16

Figgjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. november 2016 áseting av kommunuskattaprocenti, barnafrádrátti og foreldragjaldi fyri børn á dagstovni og í frítíðarskúla fyri fíggjarárið 2017.

Nevndin mælir bygdarráðnum til at samtykkja, at kommunuskattaprocentið verður 21,5% og at barnafrádrátturin verður kr. 5.000.
Somuleiðis verður mælt til at áseta somu foreldragjøld á dagstovnaøkinum, sum eru galdandi, men at hvør familja einans rindar fyri eitt barn. Hvør familja rindar hægsta gjaldið; tað lægra gjaldið/gjøldini fella burtur.
Tillagingin í foreldragjaldinum sæst aftur í 2.viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2017.

**Viðv. 189**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 190**
2. viðgerð av uppskoti fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2017.
J.nr. 00.30.10-S02-1-16

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. november 2016 uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2017.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlanina fyri Vestmanna Kommunu fyri 2017 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.
Í uppskotinum er lagt upp fyri, at broytingar verða gjørdar í foreldragjaldinum fyri barnaansingina.

**Viðv. 190**
Tilmælið var einmælt samtykt.

**Mál 191**
1. viðgerð/framløga av endurskoðaðari fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016.

**Viðv. 191**
Uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2016 varð lagt fram til 1. viðgerð.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Durita á Heygum Malan Stórá Herit Magnussen John Zachariassen